# Jógvan Arge gjørdist stóri atkvøðuslúkurin

**Jógvan Arge gjørdist stóri persónligi sigursharrin á býráðsvalinum í Tórshavnar kommunu. Við 690 persónligum atkvøðum gjørdi hann sítt til, at Tjóðveldisflokkurin fekk sítt besta býráðsval nakrantíð í Tórshavnar kommunu**

VALIÐ 04
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*–Vit hava havt ein góðan listan hesaferð, og vit eisini arbeitt væl í valstríðnum, og tað er fremsta orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin hevur fingið sítt besta val nakrantíð, sigur Jógvan Arge*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tjóðveldisflokkurin í Tórshavnar kommunu fekk sítt besta býráðsval nakrantíð. Frálíka úrtøkan kom ikki minst av mongu persónligu atkvøðunum, sum fullu fyrrverandi løgtingsliminum hjá Tjóðveldisflokkinum, Jógvani Arge, í lut.

Arge-maðurin gjørdist største persónligi atkvøðuslúkurin á valinum í Tórshavnar kommunu við 690 persónligum atkvøðum. Hetta eru góðar 200 atkvøður fleiri enn á býráðsvalinum í 2000.

– Vit hava havt ein góðan listan hesaferð, og vit eisini arbeitt væl í valstríðnum, og tað er fremsta orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin hevur fingið sítt besta val nakrantíð, sigur Jógvan Arge.

Hann leggur afturat, at tað góða arbeiðið, sum býráðslimirnir hava gjørt farnu setuna í andstøðu í Tórshavnar býráð hevur eftir øllum at døma givið ávøkst. Tjóðveldisflokkurin fekk á valinum hesaferð nærum 3000 atkvøður, og tað eru góðar 700 atkvøður fleir enn á seinasta býráðsval.

### Eingin Hoydal/Tobba effekt

Seinasta mánaðin hevur mikið rok tikið seg upp innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum, eftir at Tórbjørn Jacobsen og Høgni Hoydal hava verið uppi og táttast alment. Spurdur, um hann væntaði, at vánaliga umrøðan av flokkinum seinasta mánaðin fór at ávirka býráðsvalið í høvuðsstaðnum, svarar Jógvan Arge, at tað hevði hann ikki.

– Nei, eg væntaði ikki, at hatta stríðið fór at ávirka, kanska heldur tvørturímóti. Eg haldi hinvegin, at tjóðveldisfólk hava prógvað, at flokkurin er ein flokkur, sum tú skalt hava álit á, sigur Jógvan Arge.

Atkvøðuslúkurin fegnast um, at Tjóðveldisflokkurin fekk fýra umboð í Tórshavnar býráð á valinum, serliga tá hugsað verður um, at flokkurin varð júst ov stuttur á valinum fyri fýra árum síðan.

– Tað verður ikki minst spennandi, at vit verða tvær kvinnur og tveir menn, tí tað er altíð gott, at bæði kynini eru væl umboðað í flokkunum, sigur hann.

Á býráðvalinum í Tórshavnar kommunu hesaferð er vert at leggja til merkis, at góðar 1000 atkvøður eru fluttar í millum Tjóðveldisflokkin og Sambandsflokkin.

### Hvat leggur tú í tað?

Tað er givið, at Sambandsflokkurin ikki hevur staðið seg nóg væl í valstríðnum, og valevnislistin hjá flokkinum var heldur ikki hin besti hesaferð. Tú kanst væl eisini siga, at Fólkaflokkurin hevur eftir øllum at døma slitið upp á Sambandsflokkin í samgonguni, svarar Jógvan Arge.

Heðin Mortensen:

# »Utak er verdens løn«

**Heðin Mortensen var, beint eftir at valúrslitið varð kunngjørt, sera skuffaður av, at Sambandsflokkurin hevði so stóra afturgongd. – Eg dugi ikki at siga hvat tað kann vera, sum hevur gjørt, at vit hava mist ein mann, segði hann**

VALIÐ 04
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



– Persónliga eri eg sera væl nøgdur við valið, tí eg havi á leið sama atkvøðutal, sum fyri fýra árum síðani. Eg eri tó ómetaliga keddur av afturgongdini, sum vit hava havt. Vit hava mist ein mann, og eg dugi ikki at síggja hvør orsøkin er til tað, segði Heðin.

Hann segði, at ein møguleiki kann vera tann, at Sambandsflokkurin sum kunnugt hevur sitið í samgongu við Fólkaflokkin, sum hevði borgarstjóran.

– Borgarstjórasessurin dregur altíð atkvøður, Fólkaflokkurin hevði jú umleið 1000 atkvøður meiri enn vit, hóast vit hava samarbeitt. Tað kann vera, at vit hava mist nakrar av stemmunum til teirra, orsakað av borgarstjórasessinum, segði Heðin Mortensen.

### Hatta er takkarlønin

Hóast Heðin royndi, so dugdi hann ikki at siga, hví sambandið fekk so stóra afturgongd.

– Tað kostar at sita í samgonguni. Tað er altíð lættari at sita í andstøðuni og, ja, eg skal ikki brúka orðið kritisera, men at havast at tí, ið verður gjørt. Men vit í samgonguni hava veruliga fingið nógv av skaftið, eingin ivi um tað. Barnaansingin er nøktað, men tað fáa vit so onga løn fyri, staðfesti ein sjónliga skuffaður Heðin Mortensen.

Eisini vísti hann á, at arbeiðið við skúlum og eldraøkinum er byrjað, men at heldur ikki tað hevur givið bonus í atkvøðum.

– Soleiðis er tað bara. Utak er verdens løn, og vit mugu bara brynja okkum út til at fara víðari, segði Heðin.

Hann vísti aftur, at nógvi rumbulin í byggi- og býarnevndini, sum Heðin sjálvur var formaður í, kundi hava havt ávirkan á vánaliga valið.

– Í byggi- og býarnevndini sótu eisini andstøðupolitikarar. Tað var ikki Sambandsflokkurin, sum tók nakra avgerð einsamallur, men eitt samt býráð, staðfesti hann.

### Møguleikar

Tá sosialurin tosaði við Heðin, beint eftir valið, segði hann, at tað ynskiligasta hevði verið, at hildið fram í samgonguni, sum var seinasta skeið.

– Vit høvdu eitt sera gott samarbeiði við Fólkaflokkin, og vit fara eisini at snakka við teir fyrst, so fáa vit at síggja hvat hendir. Tað er í øllum førum ikki stuttligt at sita í minniluta í fýra ár, so vit fara at royna allar møguleikar at sleppa uppí part. Men Fólkaflokkurin er fyrsta val, segði Heðin Mortensen at enda.

## FAKTA

### Topp 10 1980-2004

1) Poul Michelsen 1307 atkv. 1984
2) Poul Michelsen 1169 atkv. 1988
3) Lisbeth L. Petersen 1003 atkv. 1996
4) Lisbeth L. Petersen 787 atkv. 1992
5) Jógvan Arge 690 atkv. 2004
6) Heðin Mortensen 667 atkv. 2004
7) Heðin Mortensen 627 atkv. 2000
8) Katrin Dahl Jakobsen 583 atkv. 2004
9) Jan Christiansen 565 atkv. 2004
10) Jan Christiansen 542 atkv. 1992

### Topp 13 í Tórshavnar kommunu 2004

1) Jógvan Arge 690
2) Heðin Mortensen 667
3) Katrin Dahl Jakobsen 583
4) Jan Christiansen 565
5) Sjúrður Olsen 503
6) Leivur Hansen 393
7) Høgni Mikkelsen 294
8) Hildur Eyðunsdóttir 288
9) Marin Katrina Frýdal 286
10) Bjarti Mohr 273
11) Annika Olsen 244
12) Elin Lindenskov 238
13) Beata L. Samuelsen 207



### Mitsubishi Grandis 2,4i Invite

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,4 litur 4 syl. 16V og 165 hk |
| 0-100 km/t | 10,0 sek |
| Bensinnýtsla | 10,6 km/l |
| Dekkstødd | 215/55-17 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 476,5 cm |
| Breidd | 179,5 cm |
| Hædd | 165,5 cm |
| Eginvekt | 1.645 kg |
| Viðførisrúm | 320 litrar |
| Prísur | kr. 355.000,- (+ kr. 3.500,- eyka fyri metallakk) |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |

# Mitsubishi Grandis við sitiplássum til 7 vaksin

**Mitsubishi Grandis varð fyrstu ferð sýndur fram á bilaframsýningini í Frankfurt í september í fjør. Grandis er ein smartur MPV við sitiplássum til 7 vaksin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Mitsubishi Grandis 2,4i Invite er ein MPV, sum er heilt øðrvísi enn vit eru von við. Designið er smart og sportsligt. Myrku rútarnir og alufelgurnar eru standard*

Mitsubishi Grandis kemur inn á MPV marknaðin úr einum heilt øðrum vinkli, enn vit eru von við, hann er lutfalsliga lágur við sera sportsligum designi.

Grandis livir upp til navnið, og hann er "grandiose" bæði so og so. Hóast bilurin er designaður soleiðis, at hann ikki sær so stórur út, er hann ein av størstu og rúmligastu MPV í sínum klassa.

Innrættingin er sera liðilig. Aftaru setrini kunnu øll leggjast niður, soleiðis at Grandis verður sum ein rúmligur vørubilur. Við setrunum uppi sita sjey vaksin fólk væl í bilinum.

Instrumentborðið er ergonomiskt rætt, og alt er lætt at koma til og at handfara. Girstongin situr í einum paneli í instrumentborðinum.

### Alt er standard

Bilurin er lættur at koma runt við í býnum og koyrieginleikarnir eru fastir, tryggir og sportsligir.

Motorurin er ein 2,4 litur bensin, við framkomnu MIVEC-tøknini við broytiligari ventilstýring, og 165 hk. Diesel útgávan kemur seinni.

Alt er standard í Grandis. Í brochuruni er alt krossað av sum standardútgerð. Fyri at taka burtur úr rúgvuni, kunnu við nevna at hann t.d. hevur ABS bremsuskipan við EBD (Elektronisk Bremsekraft Distribution), dupultvirkandi bremsukraftforsterkara, BAS (Brake Assist System), airbag framman, í síðunum og gardinairbag, 17" alufelgur, fartpilot og heilautomatiskt klimaanlegg.

Mitsubishi hava sítt egnu stabilitetssystem, sum teir kalla MASC (Mitsubishi Active Stability Control) og MATC (Mitsubishi Active Traction Control). Skivubremsur eru bæði framman og aftan.

Einasta eykaútgerðin er, at hann fæst eisini við automatiskum girum. Grandis fæst eisini sum Van.

Í vikuskiftinum verður høvi at royna Mitsubishi Grandis og aðrar nýggjheitir sum t.d Mitsubichi Colt og Citroën C5. Ivan Johansen Bilar hava opið leygardagin 13. november frá 14-16, og sunnudagin 14. november frá 14-17.



*Instrumentborðið er ergonomiskt rætt, og alt er lætt at koma til og at handfara*




*Grandis livir upp til navnið, hann ein av størstu og rúmligastu MPV í sínum klassa*



*Innrættingin er sera liðilig. Við øllum setrunum uppi sita sjey vaksin fólk væl í bilinum*